# Ætla at fáa eina stóra »kanón« til vinnudagin komandi heyst



– Karmarnir um Vinnudagin liggja í rímiliga fastari legu, men fáa vit góð hugskot um, hvussu tiltakið kann gerast uppaftur betri, taka vit tey fegin til eftirtektar, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum

**Sløk 400 fólk vóru á Vinnudegnum 2006, sum varð hildin fríggjadagin. Tað eru eini 50 fleiri enn í fjør. Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, er væl nøgdur við dagin, sum hann heldur eydnaðist sera væl**

VINNUDAGUR 06
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn ein vinnudagur er lagdur aftur um, og dómsnevndin hevur kosið Ársins virki 2006, sum gjørdist reiðaravirkið, Thor í Hósvík og Ársins átak 2006, sum gjørdist Vinnuvitan.

Út við 400 fólk vóru á Vinnudegnum í ár, sum er fleiri enn nakrantíð áður.

## Eydnaðist væl

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur, at nú Norðurlandahúsið hevur fingið nýggjar stólar, eru fleiri sitipláss í húsinum, og tí kundu tey taka ímóti fleiri fólkum hesaferð enn áður.

– Jú, eg haldi, at alt gekk væl, og at dagurin sum heild eydnaðist sera væl.

Hann sigur, at »konseptið« fyri dagin hevur verið tað sama øll árini, har Ársins virki og Ársins átak verða kosin, og síðan hevur ein røð verið av fyrilestrum, sum teir flestu á ein ella annan hátt hava snúð seg um leiðslu.

– Eins og undanfarin ár, vóru flestu luttakararnir á degnum í ár vinnulívsfólk, og síðan vóru eisini umboð fyri ymisk ráð, sum hava við vinnuna at gera, eitt nú vinnumálaráðið og fiskimálaráðið.

## Eftirmeting

Jan sigur, at Vinnuhúsið plagar at venda sær til nakrar av luttakarunum nakrar dagar eftir, at Vinnudagurin hevur verið.

– Síðan verður skipað fyri einum eftirmetingarfundi millum stigtakarar og nøkur vitjandi. Tá verður tosað um, hvussu tiltakið eydnaðist, eins og fólk hava høvi at bera fram síni sjónarmið um dagin – og somuleiðis koma við hugskotum um, hvussu dagurin kann gerast uppaftur betri.

Hann sigur, at ætlanin er eisini at skipa fyri einum slíkum eftirmetingarfundi í ár.

– Karmarnir um dagin liggja í rímiliga fastari legu, men fáa vit góð hugskot um, hvussu tiltakið kann gerast uppaftur betri, taka vit tey fegin til eftirtektar, sigur Jan.

Hann vísir á, at stigtakararnir royna at leggja onkur »yvirraskilsir« inn í skránna fyri dagin, sum kunnu snúgva seg um smá tema.

## Onkur stór »kanón«

Á veitsluni, sum var á Hotel Føroyum eftir sjálvan Vinnudagin, segði Jan Mortensen, at stigtakararnir fara at arbeiða við at fáa okkurt stórt navn higar at halda fyrilestur til dagin komandi heyst.

– Ja, eg nevndi til stuttleikar í røðu míni, at vit kundu hugsað okkum at fingið eitt navn sum Bill Clinton – ella onkran av hansara »kaliber«. Um hetta er møguligt, vita vit ikki. Bill hevur nýliga verið í Danmark og hildið fyrilestur fyri vinnulívsfólki, men vit hava skilt, at prísurin var ógvuliga høgur. Um hetta yvirhøvur letur seg gera fíggjarliga í Føroyum, vita vit ikki. Tað verður helst lættari sagt enn gjørt, men vit fara at royna, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.



*– Eg nevndi til stuttleikar í røðu míni á veitsluni, at vit kundu hugsað okkum at fingið eitt navn sum Bill Clinton – ella onkran av hansara »kaliber« til vinnudagin komandi. Um hetta er møguligt, vita vit ikki, sigur Jan Mortensen*

Jan Mortensen sigur, at fyrireikararnir fara at leggja seg í seðlan fyri at fáa onkra stóra »kanón«, sum hann tekur til, higar til lands komandi heyst.

– Vit ætla at hava okkurt nýtt og øðrvísi til Vinnudagin komandi, sigur hann.

## Ymiskir fyrilestrar

Stjórin í Vinnuhúsinum heldur, at fyrilestrarnir, sum vóru á Vinnudegnum hesaferð, vóru fjølbroyttir og áhugaverdir, og hann heldur, at teir dekkaðu evnið, sum í fyrsta lagi er leiðsla, rímiliga væl.

– Men tað vil altíð vera individuelt, hvat fæst burtur úr slíkum fyrilestrum. Summi hava hoyrt okkurt av tí, sum sagt verður, áður, og fyri onnur er tað, sum borið verður fram, ikki hoyrt áður, sigur hann.

Á Vinnudegnum vórðu fyrilestrar hildnir bæði av føroyingum og útlendingum. Guðfinna S. Bjarnadóttir, stjóri á Lærða Háskúlanum í Reykjavík, helt fyrilestur um "leadership in an ever changing enviroment", og Jan Ziskasen, stjóri í Kraft Foods, helt fyrilestur um leiðsluroyndir. Haraftrat helt Emilia van Hauen, samfelagswfrøðingur og leiðsluráðgevi, fyrilestur á Vinnudegnum.

## Góð veitsla

Jan Mortensen sigur, at veitslan, sum var á Hotel Føroyum seinni um kvøldið, eydnaðist væl.

– Út við 350 fólk vóru á veitsluni, sum varð hildin í góðum hýri – og við nógvum røðum.

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur, at tey vóru mong, sum serliga heilsaðu reiðaravirkinum, Thor, fyri heiðurin sum Ársins virki 2006.

## Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja skjótast til ber.

Vit bjóða
Spennandi, mennandi og til tíðir krevjandi arbeiðsumstøður, har høvið sjálvsagt er fyri framhaldandi, persónligari eins væl og fakligari menning í einum livandi og dynamiskum umhvørvið.

Lærutíð
Hevur tú
- FHS er lærutíðin 3 ár
- HH er lærutíðin 2 ár
- HF ella student er lærutíðin 2 ár og 18 vikur.

Setanarviðurksifti
Starvið verður sett skjótast til ber, og lønin er smb. lønarsáttmálanum hjá S&K. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Fyrispurningar
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna, samskipara í kundarøktini, á telefon 50 20 56 ella umvegis teldupost til malan@kall.fo

Umsóknir
Møguligar umsóknir saman við prógvum v.m. (CV), skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. oktober. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Send umsóknina til:

Kall
Postboks 3299
Óðinshædd 2
FO-110 Tórshavn
Viðm. Brævbjálvan "umsókn."

Ella teldupost til malan@kall.fo

kall
20 20 20